# Tá Sjúrður Skaale dumpaði

MARJUS DAM

Løgtingsmaður



Ein veljarakanning hevur aftur sæð dagsins ljós.

Tað undrar nógv, at Útvarpið bert kann Sjúrða Skaale, valevni hjá Tjóðveldisflokkinum sum óheftan viðmerkjara til hesa kanning.

At hesin skal viðmerkja veljarakanningina undrar almikið. Og eisini kann sigast, at um hann var til róvtøku, so hevði hann fingið eitt reint 00 fyri viðmerkingarnar. Tær vóru so heftar at Tjóðveldisflokkinum, at tað var heilt óneyðugt at lata Høgna Hoydal viðmerkja kanningina fyri Tjóðveldisflokkin. Tað hevði Sjúrður Skaale longu gjørt fyri sín flokk. Jú, segði hann. Tað at Karstin Hansen var farin úr Tjóðveldisflokkinum, var eitt satt kupp fyri Tjóðveldisflokkin, ið nú var heilt samdur sum flokkur. Ja, so vita vit tað – vit sum dagliga hoyra innanhýsis buldri frá hesum flokki!

Hann segði víðari, at Sambandsflokkurin hevði ein stóran leiðslutrupulleika, Edmund, Lisbeth, Kaj Leo.

Sum løgtingslimur kann eg bert vísa hesum aftur.

Sambandsflokkurin hevði og hevur góða leiðslu. Eg havi arbeitt saman við Edmund, Lisbeth og Kaj Leo. Tað gekk og gongur væl við samstarvinum í flokkinum, og vit kunnu allir/øll sita á fundi og tosa saman um eitthvørt mál. Tað kann eg siga Sjúrða Skaale. Og hvussu kann Sjúrður Skaale greina allar aðrar veljarakanningar, ið hava verið undan hesari? Har Sambandsflokkurin hevur ligið sera væl í kanningum. Hevur leiðslutrupulleikin stungið seg upp fleiri ár eftir at formenn eru skiftir út?.

Eftir míni hugsan so dumpaði Sjúrður Skaale við einum reinum 00 (null null) sum óheftur viðmerkjari. Og kringvarpið kann tí ikki nýta hendan dumpikandidat til viðmerkjara framyvir. Um teir gera taðso hava vit helst ein Putin trupulleika við Kringvarpi Føroya – nakað ið okkara nýggja lóg á økinum kann taka sær av.

# Treytaleys umbering

Tað hevur í fjølmiðlunum síðstu dagarnar verið nógv ljós varpað á rasismu í ítróttarverðini, og hevur hettar skapt ein ávísan áhuga og eisini øsing millum manna. Eisini eru úttalilsir komin fram í fjølmiðlunum, sum eru søgd av persónum, sum eru partur av Leirvíkar Ítróttarfelag, og sum betur vóru ósøgd.

Nevndin í Lervíkar Ítróttarfelag vil, saman við venjarum og spælarum, í hesum sambandi biðja um treytaleysa umbering fyri tað, sum sagt hevur verið í fjølmiðlum og millum manna, hvat viðvíkjur rasismu. Felagið vil við hesum boða frá, at felagið tekur spurningin um rasismu millum ítróttarfólk í størsta álvara, og fer felagið í framtíðini regluliga at taka hettar mál upp fyri at forða fyri, at tílíkar óhepnar støður koma fyri aftur.

*Við ítróttarkvøðu*
*Vegna nevnd, venjara og spælara*
*Leirvíkar Ítróttarfelag:*

*Ove Heinesen, form.*
*Jan Joensen, venjari*
*Magnus Skoralíð, liðskipari*

# Sandavágs kommuna setir burðardygga menning dagskrá

*Tíðindaskriv*
*Sandavágs kommuna*

Seinastu tíðina hevur Sandavágs kommuna, í samstarv við Agenda 21 Stovuna, arbeitt við at orða eina ætlan fyri burðardyggari menning í kommununi. Ætlanin umfatar tey mál kommunan setir sær á umhvørvis- og trivnaðarøkinum fram til 2010.

Seinasta heyst setti bygdarráðið í kommunu ein arbeiðsbólk at arbeiða við einari ætlan í mun til burðardygga menning í kommununi. Í bólkinum hava sitið umboð fyri bygdarráðið, kommunalu umsitingina, bygdarfólkið og Agenda 21 Stovuna.

Í ætlanini setir kommunan sær fyri at náa ítøkilig mál á hesum økjum: Reint drekkivatn, kloakkog spillivatn, náttúru- og skógrøkt, vetrarfriðing, útlát og tilfeingisnýtsla, mentunarminnir, kunning til borgaran og burturkast.

Arbeiðið við ætlanini er nú komið so væl áleiðis, at uppskotið hjá bólkinum hevur verið til hoyringar í bygdarráðnum og verður ætlanin nú løgd fram fyri borgarum og almenninginum annars.

Sandavágs kommuna hevur síðan mitt í nítiárunum arbeitt miðvíst við at betra um umhvørvið og trivnaðin. Serligur dentur hevur verið lagdur á at fáa kloakkviðurskiftini í lagi, fríðka um og at gera grøn fríøkir. At hetta hevur borið ávøkst sæst aftur í trivnaðinum millum borgararnar í bygdini og at bygdin í tveimum umførum, í 1997 og í 2003, er vald at verða best røkta bygd í landinum.

Agenda 21 Stovan bjóðar sína ráðgeving fram til kommunur í Føroyum og er ein partur av virkseminum at vera við í tilgongdini at leggja umhvørvi og umhvørvismál í kommununum í fastari karmar.

Framløgan av ætlanini verður á kommunala umhvørvisdegnum nú leygardagin 26. mai. Umhvørvisdagurin byrjar við morgunmati í SÍF-húsinum kl. 10 har framløgan eisini verður.

Umhvørvisdagurin er árligt afturvendandi tiltak har kommunan setir umhvørvið á dagskrá og rudda verður í kommununi.

# Eivør Pálsdóttir til Føroyar við symfoniorkestri

**14. juni 2007 framførir íslendska symfoniorkestrið, Eivør Pálsdóttir og Ragnheiður Gröndal í Norðurlandahúsinum undir heitinum**

TÍÐINDASKRIV

Íslendska symfoniorkestrið framførdi skránna tvey kvøld á rað seinasta vetur fyri fullum Háskólabio, og undirtøkan var avbera góð. Sum tittulin sigur, eru íslendskar landaplágur á skránni, og í Føroyum verða sjálvandi eisini føroyskir sangir á skránni.

Framførslan í fjør var serstakliga væl eydnað og alt riggaði stak væl: Útsetingarnar hjá Hrafnkeli Orra Egilssyni eru avbera góðar, Ragnheiður Ásta er eitt framúr frásøgufólk, og sangkvinnurnar báðar tóku øll á bóli. Orkesturleiðarin í Norðurlandahúsinum verður eingin minni enn okkara egni Bernharður Wilkinson, ið mangan vitjar í Íslandi sum orkesturleiðari.

Ragnheiður Ásta Pétursdóttir er kent frásøgufólk í íslendska útvarpinum, og helst hevur mangur føroyskur sjómaður hoyrt rødd hennara, meðan hann hevur fiskað undir Íslandi.

Framførslan verður, sum áður sagt, hósdagin 14. juni klokkan 19.30 .



# Føroyskur dansur á Pusherstreet

**Leygarkvøldið 2. juni fara føroyingar upp á gólv í Operaen í Christiania**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*Nielsuni@sosialurin.fo*



*Heri Joensen úr Týr fer at skipa Ormin Langa á Christiania*

Seinastu vikurnar hevur nógv rok verið á og kring Christiania, onkra løtuna hevur tað mest mint um eina krígsstøðu, men leygarkvøldið 2. juni verður eitt heilt annað stríð havt á lofti á Christiania, tá føroyingar fara upp á gólv í Operaen í Christiania.

Operaen liggur í navnframu Pusherstreet, henda gøta er næstan líka navnfram sum Strøget og Den Lille Havfrue. Síðan frístaðurin í danska høvuðsstaðnum varð til, hevur Christiania verið ein turistmagnetur, og við hasj-handlinum fekk gøtan frá høvuðsinngongdini og inn gjøgnum hjarta av Christiania navnið Pusherstreet. Navnið gjørdist so inngrógvið, at tað í eitt tíðarskeið var skrivað á Danmarkskortið hjá Krak. Tá løgreglan fyri nøkrum árum síðan koyrdi burtur hassjsølubúðirnar, var navnið tikið av Danmarkskortinum.

Tað er Edmund Sofus Jacobsen, ið til dagligt fæst við at fyriskipað tónleikatiltøk, ið stendur fyri hesi serligu hending.

Uppá gólva á miðnátt

- Ja, tað var mítt hugskot. Hetta kvøldið skipa vit fyri konsert við íslendska Petur Bén og Boys In A Band í Operaen á Christiania. Eg havi sett meg í samband við Týr og nøkur onnur sum duga Ormin Langa, um at skipa nøkur øðrindi í ein ring frammanfyri pallinum á Operaen, hetta verður á miðnátt tá øðrenn bólkarnir fara á pallin, sigur Edmund Sofus Jacobsen. Hann biður fólk, ið duga Ormin Langa um at seta seg í samband við hann á edmundjacobsen@yahoo.com.

Eftir dansin fer íslendski Pétur Ben, sum verður við á G! í ár, at undirhalda við frálíkum gittarspæli og sangi. Kendi íslendski tónleikarin Mugison hevur sagt, at Pétur Ben gav út kanska bestu fløgu í Íslandi í fjør. Kvøldið endar við, at Boys In A Band spæla seinastu konsertina á síni konsertferð kring Danmark.sigur Edmund Sofus Jacobsen.

Operaen, sum liggur á 1.hædd, er eitt hugnaligt gøjlarahølið vit sirkuslitum og barr sjálvandi. Bygningurin er er sera gamal og sterkur, hann er upprunaliga bygdur sum arbeiðspláss fyri herfólk - Á Christiania siga tey at bygningurin er frá 1820´unum. Men tað bilar onki, tí at vit hava føroyskan dans frá 1200´talinum, så kom igen, sigur Edmund í skemti.

Edmund hevur skipað fyri tónleikatiltøkum kring Keypmannahavn seinastu árini, men hetta er fyrsta tiltakið á Christiania.

- Eg havi verið í samráðingar við Christianittarnir alla vikuna. Eitt serligt fólkaslag, má eg siga. Christiania er ikki mítt dagliga stamstað, sjálvt um tað er eitt vakurt stað um summarið. Fólkið virkar sera vinarligt og erligt. Tað positiva er, at tey síggja ikki prominentar snobbar fyri nakað, sigur Edmun, og heldur fram

- Tey hava eina langa søgu aftanfyri seg, og tey eru niðri á jørðini. Tó at eg ikki eri samdur við øllum teirra meiningum, so kann man skilja, at tey irriterast yvir politi og politikarar, sum dagliga eru eftir teimum, so tey spakuliga missa øki og stoltleika. Men tak ikki feil, tey hava eitt hav av humor. Kanska er Christiania skjótt søga fyri danir, men so missur Danmark eitt av sínum best vitjaðu ferðavinnumálum, sigur Edmund Sofus Jacobsen.

Leygarkvøldið 2. juni verður so í øllum førum høvi hjá útisetum og øðrum áhugaðum, at vitja Christiania, møguliga á fyrsta sinni, men vónandi ikki á síðsta sinni.